Liting við skónum

eitur bóklingur, sum Gunnvør Bærentsen í vetur hevur givið út á egnum forlagi

Málið er livandi, men tíverri eru nógvar villur.

Teknsetingin er so vánalig, at setningar lættliga misskiljast.

Myndirnar eru góðar.

Sum handbók at arbeiða eftir er hesin bóklingur ikki góður. Uppskriftirnar eru ógreiðar og óskilligar einsamallar; men av tí at heftið alt er skjótt lisið, ger hetta seinasta kanska minni.

Gunnvør hevur fittan frágreiðingarhátt og fær vónandi lesaran at eygleiða og geva sær far um skónirnar. Tað er gott. Hon hevur gjørt virðismikið **kanningararbeiði**, sum tó, eftir mini meting, hevði havt størri virði, var tað gjøllari.

Eg skal nú við dømum grundgeva hetta mítt ummæli.

Nakrar málvillur

s. 3 vóru hugsjónir ... ið *fekk* meg — fingu meg

s. 5 stórar nøgdir av steinamosi — steinamosa

s. 6 øll ... ið kundi — kundu

s. 13 Tað kann vera hent at viga skónina og seta vektina á ein*um* sjálvheftandi navnaseðli á goymsluposan — ein - navnaseðil

s. 14 við saltsýru ella kaustisk soda — kaustiskari sodu

s. 14 hentasti máti ... man vera ein medisinfløska

s. 23 lofta tann soppin — tí soppinum

s. 23 kortini lat vera — lat kortini vera — tak ikki ...

meistra og vektarmongd haldi eg vera illa vald orð.

Teknvillur

. eigur ofta at standa í staðin fyri , t.d.

s. 10 »Best er at vaska við sápuspønum í flógvum vatni (ikki meira enn 35°), síðani skola, inntil skolivatnið er reint, fyrsta skolivatnið skal vera lunkað, tí hvørki ull ella tógv tola »hitasjokk«, t.v.s. umskifti frá einum løgi til ein annan, hvar munurin í hita er meiri enn 30°«.

s. 24 »Tað ber til at fáa tað, sum áður er litað, reytt av Xanthoriu til at skifta til blátt, men ikki øvugt«. Hendan setningin skilji eg ikki uttan so at , verður strikað aftaná litað og sett aftaná xanthoriu.

s. 8 »ið eg hevði sagt frá, sum eg lærdi« — betri hevði kanska ljóðað at sagt: at eg lærdi ella segði meg hava lært.


Villurnar, ið eru fleiri enn tær nevndu, eru heldur at lasta rættlesarunum. Onkur kann halda, at tær ikki hava so stóran týdning, men mær nýtist at nevna tær; men sum sagt gera tær tekstin torskiltan í summum førum og beinleiðis skeivan í øðrum førum. Um ikki tað var, hevði eg kortini nevnt hetta brek, tí eg haldi tað hava alstóran týdning, at alt, sum kemur út á føroyskum, er í góðum málburði og málæruætt. Eg havi hug at siga, at tað er verri at lesa vána føroyskt enn at leita sær kunnleika í útlendskum bókmentum. Tað er so skjótt at skriva skeivt hjá tí, ið lesur skeivt.

Myndatilfarið er vælvalt og gott, og bóklingurin er vakur. Hjá honum, sum ikki kennir skónirnar, er góð hjálp í hesum.

Gunnvør sigur seg hava gjørt royndir við steinamosa fyra at vísa á, at ikki er neyðugt at nýta upp til 8 ferðir so nógvan mosa sum tógv til litingar. Eg má siga, at eg hvakk við og fór at kanna, hvaðani hon kundi hava hatta talið. Steinamosi hevur verið rættuliga nógv nýttur sum litingarevni í Føroyum og stendur nevndur hjá Svabo, Landt, Jóhonnu Mariu Skylv Hansen. Men eingin teirra nevnir nøgd — bert at mosi og tógv verða løgd hvørt um annað í pottin. Katrina á Trøllanesi sigur tað sama í síni Plantuliting; men hon hevur 2 royndir við uppskrift — og rætt er — har er nógvur steinamosi farin til. Sum sæst er tógvið eisini sera myrkt. Útlendskar bøkur hava 1-4 partar av steinamosa til 1 part av tógvi, og munnu øll brúka steinamosaløgin meira enn eina ferð. Tá ið liðugt litað er, er vanliga rættuliga nógv tógv úr heilt ljósum í rættuliga dimt komið burturúr.

Edikur ger, at meira litevni fæst burturúr, jarnpottur ger, at tógvið verður myrkari, og kopar broytir eisini litin. Men at moldin skal gera stórvegis gagn í litingini (s. 12), fái eg meg illa at trúgva. Alla aðrastaðni verður mælt til at seta mosan á blot, so skitturin skolast burtur, og bert reinur mosi flýtur eftir. Ikki kann eg hugsa mær annað enn, at steinamosi við ongari mold gevur reinastan lit, men sjálvandi er tað vert at kanna.

Steinamosi gevur vakran lit úr gyltum í koparlitt og næstan reyðbrúnt; men at siga frammanundan, at tú vilt hava akkurát tann ella tann litin ber illa til, tí vaksrarstað, gróðrarlíkindi, sól o.a. ávirka litin.



Korkaliting

Greitt verður frá korkalitingog mongum miseydnaðum royndum hjá sær og øllum, sum hon hevur spurt. Niðurstøða hennara er, at hon er ov sein á sjóvarfallinum — okkurt er, sum vit hava gloymt. Einki er at ivast í tí. Okkurt hava vit mist. Veit nakar t.d. hvar sortudýki eru??

Korkaliting er tó gjølla greitt frá í teimum uppskriftum úr Føroyum, sum hon vísir á, og útlendskar uppskriftir (onkur hevur Landt og Svabo sum keldu) nýta sam viðgerarhátt, nevniliga gering í landi. Korkaleivar vórðu eltir, og viðhvørt varð kálk elt í teir. Korki og nakrar aðrar skónir geva reyðar og bláreyðar litir — korkalitt. Á Lista- og handverkaraskúlanum vóru, meðan hann var, gjørdar ymiskar royndir, og serliga ein næmingur litaði við korka. Hon gjørdi beint eftir uppskrif Svabos, nýtti bara bálurnar, setti at gera í landi, men elti tó ikki korkaleivar. Tógvið varð vakurt korkalitt. Eitt sindur er tað ljósnað í vaski. Tó má sigast, at enn 6-7 ár seinni er tað vakurt reytt. So nógvar royndir, at vit kunnu tosa um haldgott kanningartilfar, vóru kortini ikki gjørdar, men miseydnað roynd var eingin. Rithøvundurin kemur til ta niðurstøðu, at kemiska samansetingin í landinum hevur týdning. So man vera. Allar gamlar uppskriftir nevna eisini hetta. Vínsteinur verður latin í summar reyðar litir, so tá ið Gunnvør á s. 8 skrivar: »tað er ikki óhugsandi, at vínsteinur er tað, ið skal til fyri betri at varðveita litin«, undrist eg á, at hon ikki roynir um so er. Tað er skjótt gjørt hjá henni, sum kannar, at gera nakrar royndir við vínsteini og nakrar uttan. Eisini kundi hon samstundis gjørt nakrar royndir við øðrum kemikalium so sum salti, pottøsku, tinni og kanska eisini hvíttøli, eggjahvítaevni onkusvegna.

s. 9 »Tá eg hugsi afturumaftur, er tað møguligt, eg kundi hava fingið leiðbeining aðrastaðnis, tí sagt er frá, at í Noreg, Svøriki, Íslandi, Wales, Hetlandi, Orknoyggjunum, Skye og Norðurirlandi verður enn litað við skónum, ...« Tá ið tú lesur hetta, hevur tú hug at spyrja, hví hon ikki hevur leitað sær vitan úr onkrum av hasum støðunum. Tó haldi eg, at Gunnvør bara við at nevna tað eggjar onkrum til viðari kanningararbeiði. A. s. 18 hevur hon hugleiðingar um orð. Orseille var í Fraklandi og har á leið vunnið úr skón, sum eitur Rocella Tinctoria; men man tað ikki vera so, at vit norðanfyri hava kallað tað orseille-litt, sum kom úr fleiri ymiskum skónum, bara tað var reytt, eins og vit enn kalla ymiskt Indigo, bara tað er blátt. Umbilicaria Pustulata verður t.d. eisini søgd at geva sera vakran reyðan lit — reyðviolett.

At nýta Salmiakspiritus í staðin fyri land til gering hóvar okkum í dag betur, eingin ivi er um tað. Løgið er tað kortini, tí hvørt luktar verri enn annað.

Gulaskón

Xanthoria Parientina, gulaskón, er tann skónin í bóklinginum, sum ikki er væl kend í sambandi við liting í dag. Tað er tí skilligt, at Gunnvør Bærentsen fróist um at hava »funnið hann«, sum hon skrivar í forordinum. Tað er virðismikið at gjørt verður vart við hesa skón, sum eisini er nevnd í fleiri útlendskum bókum. Eileen M. Bolton sigur í Lichens for Vegetable Dying frá, at tað einaferð er eydnast henni at fáa hendan bláa litin. Allar royndir, hon seinni hevur gjørt við hesi skón til blátt, eru miseydnaðar. Hon skyldar upp á sólina. Esther Nielsen sigur seg hava roynt, men allar royndir hennara eru miseydnaðar. Hon fær bara ljósareytt burturúr. Spennandi er um nú fleiri royndir verða gjørdar við guluskón. Náttúrublátt fáa vit annars bara úr Indigo-plantuni, nú Vaid er at kalla oydd.

Viðmerking til s. 8 og s. 22: Gult og reytt geva altíð grønt og reytt og blátt geva violett.

Innihaldsyvirlit vantar

Skal bók nýtast sum lærubók ella handbók, eiga uppskriftir at vera klárt uppsettar og helst í sama mynstri í øllum dømum — t.d. soleiðis sum Føroyskt Heimavirki ger í bókini hjá Katrinu á Trøllanesi. Eisini eigur at vera lætt at finna tað, sum stendur í bókini, uttan at neyðugt skal vera at lesa tekstin úr byrjan í enda. Soleiðis er ikki her. Innihaldsyvirlit og orðalisti høvdu gjørt mun.

s. 26 skrivar Gunnvør:

»Eitt er ið restar í hjá mær, eg veit ikki enn, hvussu haldgóðir litirnir eru ... Í vaski eru teir haldgóðir, men fær ljósið teir at fána?«

Hetta kann lættliga kannast. Vanligt er at meta lithaldgóðsku í stigum 1-8, sum siga frá, hvussu nógv tógvið er litfarið eftir 100 sóltímar. Hendan royndin kann gerast soleiðis: Vev nýlitað tógv um 2 pappetti. Legg annað pettið í vindeygakarmin og hitt í eina skuffu ella eskju við loki. Bíða so til tíðin er farin. Tak royndina, sum hevur ligið í myrkri, fram og samanber so. Sjálvandi ber eisini til at gera hesa roynd skjótari á rannsóknarstovu, men hin mátin gevur góða leiðbeining.

Virðið náttúruna

»Tað kann tykjast løgið, at tað vóru hugsjónir um at eira steinamosan, ið fekk meg undir hetta arbeiði, og tó var tað so. Mær hugaði litið at nýta tær ovurstóru nøgdir av mosanum, ið tilráddar vóru, líkalitið sum mær hugaði at frætta um, hvussu farið var í hagan við posa og sekk at skava steinamosa; tí fór eg undir at greiða frá, hvussu framferðarháttur við steinamosan átti at vera í vón um, at føroyingar fóru at geva hesum vøkstri ans, samstundis sum eg vísti á, hvussu lítið, ið neyðugt var at nýta.

At korkin eisini var mær í huganum, vil eg ikki nokta fyri, og tá eg aftaná tógvið strið kom fram til viðgerðarháttin — ella ein av viðgerðarháttunum av korka, var tað mín hugsan, at við a vísa á korka sum litingarevni vildi áhugin spjaðast og av tí gravgangurin eftir steinamosa minka«.

Soleiðis skrivar Gunnvør Bærentsen, hví hon er farin undir hetta arbeiði.

Ger hesin bóklingur, at fólk geva sær betur far um náttúru okkara og eyðræna minni, so er nógv vunnið. Eg havi hug at gera vart við, at (greinamosi) Hypogymnia physodes ikki gevur so vakran lit sum steinamosi, og tá Gunnvør á s. 25 skrivar »Eg havi sæð Hypogymnia í stórari mongd í Viðalundini í Havn«, so fari eg at biðja fólk hugsa um, at viðalundin í Havn er uppaftur skjótari at rudda enn steinarnir í Føroyum, og at dálkingin er størsta hóttan steinamosa.

Í plantuliting skal altíð farast við høgv. Á s. 23 verður víst á góða orðatakið: Vit eiga ikki jørðina men læna hana frá eftirkomarunum.

Tað eiga vit altíð at hava í huga.

Súsan í Jákupsstovu